## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Gul, til stívt andøvsgul av suðri og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørki í støðum. Hitin millum 10 og 13 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Lot til andøvsgul av suðri og landsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørki í støðum. Hitin millum 10 og 13 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Fleyr til gul av landsynningi ella av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørki í støðum. Hitin millum 9 og 12 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Lot til andøvsgul av landnyrðingi. Leygardagin yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 7 og 10 stig, men sunnudagin ælingur. og hitin fellur niður í 4 til 7 stig.

# Kapping er góð

**Fyrireikararnir av fyrstu kappingini í gospeltónleiki hava fingið blóð á tonna og rokna við, at kappingin verður hildin aftur um eitt ár**




*Oliva Mikkelsen og bólkurin In Gethsemane vóru við í finaluni í Gospel 2003 leygarkvøldið*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Leygarkvøldið endaði kappingin Gospel 2003. Hetta var fyrsta royndin at hava eina kapping fyri gospeltónleikarar her á landi 9 bólkar vóru við í kappingini, og tað gjørdist I AM, sum vann.

– Hetta eru fyrstu ferð, at vit skipa fyri slíkari kapping, og tí eru vit væl nøgd við undirtøkuna. Vit høvdu sett okkum fyri, at vit skuldu hava í minsta lagi 8 bólkar, og nú tá ið vit fingu 9 bólkar við í kappingina, eru vit væl nøgd, sigur Eyðun Jacobsen, sum er ein av fyrireikarunum.

– Tiltøkini hava gingið sera væl, og nógv fólk hevur eisini verið og lurtað, so hetta gevur okkum blóð á tonna til at halda fram, og eg rokni við, at um eitt ár, so verður slík kapping aftur, sigur hann.

**Kapping er góð**

Summi halda, at tað er óneyðugt við eini kapping í gospeltónleiki, men fyrireikararnir halda, at júst ein kapping kann hava nógv gott við sær.

– Hetta gevur tónleikarum, sum ikki hava verið so nógv frammi, møguleikan at koma fram við sínum tónleiki og boðskapi, og tað hava verið fleiri bólkar við í kappingini, sum vit einki kendu til frammanundan, og sum hava gjørt tað sera gott, sigur Eyðun Jacobsen.

– Ein kapping fær eisini tónleikarar at gera eitt sindur eyka burtur úr, tá ið teir spæla, og tað er bara gott fyri bæði tónleikin og boðskapin, sum teir hava at bera.

Vinnarin av kappingini gjørdist I AM, men sangarin í bólkinum, Birgir Sigurðsson, helt, at tað vóru bara vinnarar í eini slíkari kapping.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷1 |
| Nuuk | 0 |
| Qaqortoq | 5 |
| Ammassalik | 7 |
| Saint John's | 13 |
| Halifax | 17 |
| Reykjavík | 10 |
| Seyðisfjørður | 9 |
| Tórshavn | 10 |
| Lerwick | 10 |
| Aberdeen | 12 |
| London | 16 |
| Tromsø | 4 |
| Bergen | 9 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 6 |
| Keypmannah. | 9 |
| Helsinki | 5 |
| Moskva | 8 |
| Berlin | 12 |
| Warzawa | 8 |
| Kiev | 7 |
| Bukarest | 14 |
| Paris | 17 |
| Madrid | – |
| Róm | 22 |
| Malorca | 26 |
| Athen | 23 |
| Malta | 23 |
| Tunis | 27 |
| Beijing | 15 |
| New Dehli | 30 |
| Bangkok | 31 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | 17 |
| New York | 20 |
| Miami | 29 |
| Los Angeles | 25 |
| Meksikobýur | 16 |
| Panama | – |
| La Paz | 14 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 20 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 970 hPa. í útsynning úr Íslandi fer móti Hvarvinum. Eitt hátrýst, 1041 hPa. yvir Suður-Noreg stendur mestsum í stað.




Hátrýstið yvir Suður-Noreg stendur mestsum í stað og gevur framvegis lýtt veður á okkara leiðum. Brúgvalagið frá Íslandi til Írlands verður í høvuðsheitum vestan fyri Føroyar.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 13/10 kl. $06^{00}$– 14/10 kl. $06^{00}$. Hitin í gjár: 10,3°
Minsti hiti máldur í okt.: ÷4,0° Mesti hiti máldur í okt.: 18,4°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 2,0 mm – mált frá 13/10 kl. $06^{00}$–14/10 kl. $06^{00}$
Avfallið higartil í oktober: 37,5 mm

Spf.
…hvør sigur at vit eru sum onnur?
HESTPRENT
Dvørgastígur 7
100 Tórshavn
tel 31 45 55
fax 31 80 26
hestoy@hestprent.fo

JUNIOR
BUSS TAXA KOYRING
pláss til 10 ferðandi
Tlf. 22 33 11
Eyðbjartur Danielsen
Pætursgøta 14 • FO-188 Hoyvík • Tórshavn

## VESTFALLSKYRRINDI

10. oktober: Fullmáni
14. oktober: Mánin longst frá jørðini
18. oktober: Seinna kvarter

Kelda. Álmanakkin 2003

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | Suðuroyar-/ Vágafirði sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | Hestfirði/ Sundalagnum sp. | Vestmanna-sundi fp. | Vestmanna-sundi sp. | Mykines-firði fp. | Mykines-firði sp. | Nólsoyar-firði fp. | Nólsoyar-firði sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði sp. | Hvanna-sundi fp. | Hvanna-sundi sp. | Fugloyar-firði fp. | Fugloyar-firði sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 15. okt | 10.50 | 23.12 | 09.50 | 22.12 | 10.05 | 22.27 | 00.29 | 12.50 | 01.29 | 13.50 | 09.05 | 21.27 | 08.05 | 20.27 | 11.05 | 23.27 | — | 12.05 | 10.35 | 22.57 | 11.50 | — |
| 16. okt | 11.34 | 23.58 | 10.34 | 22.58 | 10.49 | 23.13 | 01.12 | 13.34 | 02.12 | 14.34 | 09.49 | 22.13 | 08.49 | 21.13 | 11.49 | — | 00.27 | 12.49 | 11.19 | 23.43 | 00.12 | 12.34 |
| 17. okt | — | 12.22 | 11.22 | 23.58 | 11.37 | — | 01.58 | 14.22 | 02.58 | 15.22 | 10.37 | 23.13 | 09.37 | 22.13 | 00.13 | 12.37 | 01.13 | 13.37 | — | 12.07 | 01.58 | 14.34 |
| 18. okt. | 00.58 | 13.34 | — | 12.34 | 00.13 | 12.49 | 02.58 | 15.34 | 03.58 | 16.34 | 11.49 | — | 10.49 | 23.26 | 01.13 | 13.49 | 02.13 | 14.49 | 00.43 | 13.19 | 01.58 | 14.34 |

5 707265 100036 >